# Fólkanövn í Suðuroyar sýslu 1801

*Eftir Jákup í Jákupsstovu.*

Navnið spillir ongan, sigur føroyskt orðatak, men ikki skerst burtur, at navnagávan ein mun ber boð um støðu fólks, málsliga, mentunarliga, trúarliga og politiskt.

Í tjóðveldinum forna var meginparturin av fólkanøvnunum av norrønum uppruna, og har aftrat vóru nøkur keltisk. Við kristindóminum komu bíbliunøvnini og nøvn á øðrum heilagum kvinnum og monnum. Hesi eru framvegis stórur partur av fólkanøvnunum í Føroyum, men meðan tey í einahandilstíðini vórðu skrivað á donskum, so hava tey nú fyri ein part fingið føroyskt snið. Fólkanøvn av norrønum uppruna, sum eina tíð vóru um at hvørva, eru nú aftur í menning, men samstundis koma fram fremmand nøvn, sum eiga onga heimild í føroyskum.

Í høvuðsdráttum vita vit um hesa framferð í navnasiðum, men ikki vita vit nágreiniliga, t. d. hvussu nær tey norrønu nøvnini vóru við at hvørva, og hvørji tey nøvn vóru, ið trokaðu hesi burtur, hvussu mong ið tey vóru og hvussu útbreidd.

Roynt verður í hesari ritgerð um fólkanøvn í Suðuroyar sýslu 1801 at finna tilfar og ein viðgerðarhátt, sum gevur okkum svar upp á hesar og møguligar aðrar spurningar, so vit ikki bert fáa at vita, hvørji nøvn vóru til eina ávísa tíð, heldur eisini hvussu vanlig ella óvanlig tey vóru sammett við øll hini í bygdini ella sýsluni.

Um umstøður verða til tess, verður í seinni ritgerðum roynt at greiða somu spurningar í øðrum pørtum av Føroyum.

Elsta navnatilfarið er at finna í Föroyingasögu, á rúnasteinum, í staðanövnum, fornbrövum, kvæðum og sögnum, jarðarbókum, tingbókum, kirkjubókum o.s.fr., men í flestum hesum heimildum er so stórur partur av fólkinum útihýstur, at ikki fæst annað enn hylling á navnasiðum. Kirkjubókin átti at verið besta heimild, tí í hana koma öll uttan mun til ætt ella stætt, men í Suðuroy, sum vit hava sett okkum fyri at kanna fyrst, er eingin kirkjubók til fyrr enn í 1745. Haðani er hon förd fram til 1784, men so er givið uppat, og einki er fört í bókina í 21 ár, so heldur ikki kirkjubókin er í hesum föri frægari heimild enn teir fyrstu manntalslistarnir.

Tilfarið til hesa kanning av fólkanövnum í Suðuroyar sýslu 1801 er manntalið 1801[1]). Manntal varð hildið í Föroyum 1769[2]), men manntalið 1801 er tað fyrsta, ið nýtt kann verða til hagfröðilig endamál[3]). Vanliga verður hetta manntalið dagfest 1. februar 1801, men veruliga er tað manntalið 1. august 1801, sum roknað verður við í öllum almennum ritum, tó hevur Arnbjörn Mortensen í ritgerð síni[3]) gjört neyðugar rættingar, so manntalið svarar til almennu dagfestingina.

Fólkatalið í Föroyum 1801 var 5.265, og slök 15 % búðu í Suðuroy. 1. februar var talið 775, og 1. august var tað 781. Munurin eru bara 6 fólk, við tað at 12 eru född, 6 deyð og eingin fluttur til Suðuroyar ella úr oynni í tíðarskeiðnum 1. februar—1. august 1801.

Fyri kanning av fólkanövnum hevur tað helst ongan týdning, hvat av hesum báðum íbúgvatölunum, 775 ella 781, ið nýtt verður. Er nakað frávik, skal tað verða viðmerkt.

---

[1]) Manntalslistin 1801 á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. Makarit á Landsskjalasavninum í Tórshavn.

[2]) Statistiske Meddelelser 1850: 1, 2, 2, við ávísing á Carl Pontoppidans Magazin 1ste Deel Side 290 og Thaarups statistiske Tabeller 1825. Tabel XXXV. Somu Statistiske Meddelelser nevna eina fólkateljing í Föroyum 1782, men hetta er teljing J. Chr. Svabo's í Indberetninger, pag. 602 f., sum Statistiske Meddelelser hevur eftir J. Landt's Beskrivelse over Færöerne, s. 458.

[3]) Arnbjörn Mortensen: Fólkatalið og ognarbýtingin í Föroyum um 1600. Fróðskaparrit, 3. bók, Tórshavn 1954.

Növn eru allastaðni í hesi ritgerð í fyrsta umfari skrivað sum í manntalslistanum, og haðani fæst hetta yvirlit:

| | | |
|---|---|---|
| 1) Qvalböe Sogn | | 202 |
| 2) Frodeböe Sogn: | | |
| Frodeböe | 53 | |
| Ördeviig | 26 | |
| Trongiswaag | 42 | 121 |
| 3) Porkeröe Sogn: | | |
| Porkeröe | 95 | |
| Næss | 16 | |
| Hove | 50 | 161 |
| 4) Waay-Sogn | | 101 |
| 5) Famöens Sogn | | 48 |
| 6) Sumböe Sogn | | 148 |
| Summa Sumarum over Folketallet i Suderöe Præstegield ved 1 Augusti 1801 | = | 781 |

## *Hvalböur*

Leere Præstegaard, Stenkulsværket, Schaalun, Gilliun, Houlum, Garsenni, Hamri, ved Krov, aa Hegji, ved Toftir, ved Nöst, Ness. Tilsamans 40 húski, 202 fólk.

*Kvinnur:*

11 Anna
3 Anna Chatrina
1 Anna Malena
1 Anna Maria
2 Anna Sophia
2 Bille
1 Caren Maria
2 Charen
5 Chatrina
3 Christine
1 Cicilia
1 Elisabeth Christine
4 Ellen
1 Ellen Malena
1 Ellen Maria
12 Elsebeth
1 Elsebeth Helena
2 Elsebeth Maria
2 Johanna
2 Lisbeth
5 Malena
12 Maren
1 Maren Abigail
1 Maria
1 Mariane
1 Marianna
1 Margretha Chatrina
1 Sara Maria
8 Sunneva
5 Susanna

94 kvinnur í Hvalbö 1801

*Menn:*

6 Andreas
1 Antonius
1 Christian Rubek
2 Christopher
1 Clement
7 Daniel
2 Elias
1 Ellender
1 Gregers
2 Gulak
2 Hans
1 Henrich Ludvig
10 Jacob
1 Jacob Johannes
1 Jan Bærent
4 Jens
1 Jesper
8 Joen
1 Joen Jacob
1 Joen Zidske
1 Johan Peder
5 Johannes
2 Lars
1 Magnus
3 Michel
3 Morten
5 Niclas
13 Ole
6 Peder
5 Poul
3 Rasmus
2 Simon
1 Sören
3 Thomas
1 Thorleif

108 menn í Hvalbö 1801

## *Froðböur*

aa Böe, under Schorum, aa Hamri. Tilsamans 8 húski, 53 fólk.

*Kvinnur:*

3 Anna
3 Anna Chatrina
1 Anna Sophia
1 Chatrina
1 Dorthea
1 Ellen Maria
2 Elsebeth
1 Elsebeth Marie
2 Malena
4 Maren
2 Sunneva
4 Susanna
1 Susanna Sophia

26 kvinnur í Froðbö 1801

*Menn:*

1 Anders
1 Andreas
3 Jens
2 Jesper
4 Joen
2 Magnus
4 Michel
1 Morten
1 Niclas
1 Ole
1 Peder
2 Peder Lave
1 Rasmus
2 Simon
1 Thomas

27 menn í Froðbö 1801

## *Öravík*

ved Aae, uppe aa Böe. Tilsamans 4 húski, 26 fólk.

*Kvinnur:*

2 Anna
1 Anna Lisbeth
1 Chatrina
1 Christine
1 Ellen
1 Elsebeth
1 Malena
2 Maren
3 Sunneva

13 kvinnur í Öravík 1801

*Menn:*

2 Daniel
1 Gulak
1 Jesper
2 Johannes
2 Michel
1 Morten
1 Niclas
1 Peder
1 Poul
1 Sören

13 menn í Öravík 1801

## *Trongisvágur*

Siovertofte, i Svalbare, i Huuse. Tilsamans 10 húski, 42 fólk.

*Kvinnur:*

2 Anna
5 Chatrina
1 Ellen
1 Ellen Maria
1 Elsebeth
1 Elsebeth Chatrina
1 Elsebeth Malena
4 Maren
1 Marie Chatrine
3 Sunneva

20 kvinnur í Trongisvági 1801

*Menn:*

1 Abraham
1 Anders
2 Daniel
1 Gulak
2 Jacob
3 Joen
1 Magnus
1 Michel
3 Peder
3 Poul
1 Simon
2 Thomas
1 Thormand

22 menn í Trongisvági 1801

## *Porkeri*

Giörum, Nye Görum, utan Heja, under Homrum, Æstrum, ved Geil, i Bökkum, aa Hegji, ved Aae, Kloven. Tilsamans 16 húski, 95 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 4 Anna | 5 Daniel |
| 1 Anna Lisbeth | 1 Gabriel |
| 1 Barbara | 1 Hans |
| 2 Bille | 1 Jacob |
| 3 Birgitte | 1 Jesper |
| 1 Chatrina | 11 Joen |
| 1 Christen | 1 Joen Willum |
| 2 Christine | 4 Johannes |
| 4 Elsebeth | 1 Lars |
| 1 Elsebeth Susanna | 3 Magnus |
| 6 Lisbeth | 2 Michel |
| 3 Malena | 2 Morten |
| 5 Maren | 2 Niclas |
| 1 Margretha | 5 Ole |
| 9 Sunneva | 3 Peder |
| 1 Sunneva Susanna | 1 Poul |
| 4 Susanna | 1 Simon |
| | 1 Zacharias |
| 49 kvinnur í Porkeri 1801 | 46 menn í Porkeri 1801 |

## *Nes*

i Siovertofte, aa Jagri. Tilsamans 2 húski, 16 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 1 Anna | 2 Daniel |
| 2 Chatrina | 2 Jens |
| 1 Ellen | 1 Joen |
| 1 Lisbeth | 1 Peder Antonius |
| 1 Malena | 1 Poul |
| 2 Sunneva | 1 Simon |
| 8 kvinnur á Nesi 1801 | 8 menn á Nesi 1801 |

## *Hov*

ved Gaard, aa Brekku, Lasgare, aa Brigv, under Homrum. Tilsamans 10 húski, 50 fólk.

*Kvinnur:*

3 Anna
1 Barbara
1 Chatrina
2 Lisbeth
2 Malena
5 Maren
7 Sunneva
1 Sunneva Malena
1 Susanna

23 kvinnur *í Hovi* 1801

*Menn:*

3 Daniel
1 Gutte
3 Jesper
5 Joen
2 Johannes
1 Magnus
1 Michel
2 Morten
2 Niels
4 Ole
2 Simon
1 Zacharias

27 menn í Hovi 1801

## *Vágur*

Gioveraa, Misa, Smidlum, ved Kraajer, Ŏre, Schaale, Qvandalsaae, i Toften, Siurhuuse. Tilsamans 16 húski, 101 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 6 Anna | 2 Andreas |
| 1 Anna Kristina | 2 Augustinus |
| 2 Anna Malena | 1 Clement |
| 1 Anna Margretha | 1 Daniel |
| 1 Anna Maria | 1 Daniel Joen |
| 3 Bille | 1 Hans |
| 1 Birgitte | 7 Jacob |
| 2 Chatrina | 1 Jacob Horn |
| 1 Cicilia | 1 Jesper Joen |
| 6 Elsebeth | 10 Joen |
| 1 Elsebeth Helena | 1 Joen Willum |
| 3 Lisbeth | 1 Johan Hendrik |
| 7 Maren | 3 Magnus |
| 2 Margrethe | 1 Michel |
| 1 Marianna | 2 Morten |
| 9 Sunneva | 4 Niclas |
| 1 Sunneva Kristina | 2 Ole |
| 1 Sunneva Malena | 1 Peder |
| 3 Susanna | 1 Poul |
| 1 Susanna Sophia | 1 Poul Joen |
| | 3 Thomas |
| 53 kvinnur í Vági 1801 | 1 Thomas Joen |
| | |
| | 48 menn í Vági 1801 |

## *Fámjin*

aa Tajen, aa Heaflötte, i Tröen, i Siuregare, Haiman Kirke. Tilsamans 10 húski, 48 fólk.

*Kvinnur:*

6 Anna
1 Anna Chatrina
2 Anna Elisabeth
1 Chatrina
1 Christianna
1 Ellen
1 Elsebeth
1 Elsebeth Malena
5 Malena
1 Maren
1 Marianna
5 Sunneva

26 kvinnur í Fámjin 1801

*Menn:*

1 Daniel
2 Hans
4 Jacob
1 Jesper
2 Joen
1 Johannes
1 Lars
2 Michel
1 Niclas
2 Ole
1 Samuel
1 Simon
3 Thomas

22 *menn í Fámjin* 1801

*Sunnböur*

i Görum, ved Qvija, i Hörg, under Hamri, aa Krosse. Tilsamans 28 húski, 148 fólk.

| *Kvinnur:* | | *Menn:* | |
|---|---|---|---|
| 2 | Agitha | 1 | Andreas |
| 7 | Anna | 1 | Antonius |
| 2 | Anna Maria | 1 | Berthel |
| 1 | Bille | 5 | Daniel |
| 1 | Birgitte | 1 | Daniel Jacob |
| 1 | Chatrina | 2 | Hans |
| 1 | Cicilia | 9 | Jacob |
| 1 | Ellen | 5 | Jens |
| 8 | Elsebeth | 2 | Jesper |
| 1 | Elsebeth Maria | 10 | Joen |
| 1 | Elsebeth Sophia | 1 | Joen Jacob |
| 1 | Juliana | 8 | Johannes |
| 5 | Lisbeth | 1 | Lars |
| 1 | Malena | 2 | Michel |
| 13 | Maren | 1 | Morten |
| 1 | Margrethe | 9 | Niclas |
| 1 | Rachel Maria | 2 | Ole |
| 8 | Sunneva | 2 | Peder |
| 1 | Sunneva Christina | 3 | Poul |
| 1 | Sunneva Maria | 2 | Samuel |
| 4 | Susanna | 2 | Simon |
| 1 | Susanna Maria | 2 | Sören |
| | | 12 | Thomas |
| 63 | kvinnur í Sunnbö 1801 | 1 | Zacharias |
| | | 85 | menn í Sunnbö 1801 |

*Kvinnunövn í Suðuroy 1801*

*Abigail.* Í Suðuroy kemur A. bara fyri sum samansett navn Maren A.

2 *Agitha,* báðar í Sunnbö, ávikavist 74 og 64 ára gamlar.

45 *Anna* eru í öllum bygdum í Suðuroy, og umframt tær 45, ið hava A. sum einasta fornavn, eru 23, ið hava A. sum fremra navn av tveimum.

7 *Anna Chatrina.* A. C. eru tríggjar í Froðbö, allar í sama húsi á Bö: 66 ára móðir bóndans, 29 ára ógift húshjálp og 8 ára dóttir bóndans. Eisini í Hvalbö eru tríggjar A. C.: 44 ára prestakonan, ein 23 ára ógift húshjálp hennara í Leirum og ein 5 ára genta við Krógv. Í Fámjin er A. C. 22 ára kona yngra bóndans í Tröðum.

2 *Anna Elisabeth,* báðar í Fámjin: 48 ára matmóðirin á Teigum og 17 ára dóttir hennara.

1 *Anna Kristina* er 5 ára dóttir bóndans í Skálum í Vági.

2 *Anna Lisbeth.* Onnur er yngst av 3 systrum (4 systkjum) á Bö, Öravík, og hin er einasta barn á Klova, Porkeri. Báðar eru á 2 ára aldri.

3 *Anna Malena.* Systurdóttir prestaeinkjunnar í Vági heldur hús hjá hjálparprestinum. Hon er ógift, men eigur 3 ára dóttir A. M. Onnur A. M. er somuleiðis 3 ára dóttir á Oyri í Vági, og triðja A. M. er 5 ára dóttir á Hamri í Hvalbö.

1 *Anna Margretha* er 2 ára óskilgitin genta í Toftum í Vági.

4 *Anna Maria.* Í Toftum í Vági eitur yngsta dóttir bóndans A. M. Hon er 2 ár eins og Anna Margretha í sama húsi. Tvær A. M. eru í Sunnbö, báðar á 11 ára aldri, og ein 13 ára A. M. er í Hvalbö.

3 *Anna Sophia.* Tvær eru í Hvalbö: 5 ára elsta dóttir í Garðshorni og 8 ára miðlingadóttir á Hólum. Á Hamri í Froðbö er A. S. 8 ára dóttir bóndasonarins yngra.

2 *Barbara.* Eldra B. er 78 ára einkja í Porkeri, meðan yngra B. er 18 ára dóttir Símunar í Leivsgarði í Hovi. Skyldskapur teirra millum er ikki óhugsandi. Eisini faðir at eldru B. æt Símun.

8 *Bille.* Tvær gamlar konur í Hvalbö (93 og 71 ár) eita B., men yngri enn 70 ár er eingin B. í norðaru helvt av Suðuroynni. Í syðru helvt er eisini ein gomul B., 86 ára einkja í Bökkum í Porkeri. Hon er abbasystir at aðrari B., sum er 12 ár og býr í sama húsi. Í Vági eru tríggjar B., 38, 14 og 8 ár. Yngsta B. er 7 ár og býr í Sunnbö.

5 *Birgitte.* Elsta B. er 51 ár, ógift, og býr í Sunnbö. Onnur

B., 48 ár, er í aðru giftu matmóðir í Bökkum í Porkeri. Á Heyggi í Porkeri er ein 10 ára B., og í Görðum í Porkeri ein 5 ára B. Í Skálum í Vági er ein 7 ára B.

1 *Caren Maria* Nattestad, 8 ár, Hvalbö.

2 *Charen* eru báðar konur í Hvalbö, 53 og 25 ár.

20 *Chatrina* eru í öllum bygdum í Suðuroy, og umframt tær 20, ið hava C. sum einasta fornavn, eru 10, ið hava C. sum seinna navnið í samansetingunum Anna C., Elsebeth C., Margretha C. og Marie C., men sum fremra navn av tveimum kemur C. ikki fyri.

1 *Christen* er einnevnd 38 ára kona í Porkeri.

1 *Christianna* er somuleiðis einnevnd 14 ára genta í Fámjin.

6 *Christine* er 92 ára einkja uppi á Bö í Öravík. Tríggjar C. eru í Hvalbö, 33, 28 og 22 ár. Í Görðum í Porkeri eitur 26 ára bóndakonan C., og á grannagarðinum Nýgörðum er C. elsta dóttir, 6 ár. Har aftrat eru 4, ið hava C. (K.) sum seinna navn í samansetingum: Anna Kristina, Elisabeth Christine, Sunneva Christina og Sunneva Kristina.

3 *Cicilia* er 56 ára prestaeinkja í Vági. Onnur er 35 ára matmóðir í Sunnbö og triðja er 25 ára ógift systkinabarn konu Óla sýslumans Evensens í Hvalbö.

1 *Dorthea* er 12 ára »Tienestepige« í Froðbö.

*Elisabeth* finst bert í samansetingum Anna E. og E. Christine.

1 *Elisabeth Christine* er 10 ára bóndadóttir við Neyst í Hvalbö.

9 *Ellen*. Fýra eru í ymsum húsum í Hvalbö, 49, 37, 13 og 12 ár. Har aftrat er ein í hvörji av hesum 5 bygdum: í Trongisvági, 62 ár, Fámjin, 53 ár, Sunnbö, 45 ár, Öravík, 29 ár, og á Nesi, 15 ár. E. er eisini fremra navn í samansetingunum E. Malena og E. Maria, men E. kemur ikki fyri sum seinna navn í samansetingum.

1 *Ellen Malena* er 7 ára genta í Hvalbö.

3 *Ellen Maria,* allar yngri enn 7 ár, í Hvalbö, Froðbö og í Trongisvági.

35 *Elsebeth* eru í öllum sóknum í Suðuroy, og har aftrat eru 11, ið hava E. sum fremra navn av tveimum:

1 *Elsebeth Chatrina* er pinkubarn í Trongisvági. Her sæst, hvussu lítið ið kann leggjast í, hvört »a« ella »e« er endabókstavur, tí í sjálvum manntalslistanum stendur Elsebeth Chatrina 1 ár; men í yvirliti fremst í sama manntalslista yvir tey, ið född eru millum 1. februar og 1. august 1801, er sama genta stavsett Elsebeth Chatrine.

2 *Elsebeth Helena.* Onnur er 12 ára dóttir sóknarprestsins í Leirum, og hin er 4 ára dóttir bóndans í Toftum, Vági.

2 *Elsebeth Malena.* Onnur er 22 ára kona í Trongisvági, og hin er 4 ára genta heiman Kirkju í Fámjin.

4 *Elsebeth Maria* eru allar yngri enn 4 ár. Tvær eru í Hvalbö, ein í Froðbö og ein í Sunnbö.

1 *Elsebeth Sophia* er 2 ára genta í Görðum í Sunnbö.

1 *Elsebeth Susanna* er minni enn ársgomul dóttir bóndans í Görðum í Porkeri.

*Helena* er bara í samansetingini Elsebeth H.

2 *Johanna.* Onnur er 68 ára gomul genta og hin 12 ára genta, báðar í Hvalbö, men ikki í sama húsi.

1 *Juliana* er 5 ára dóttir bóndans á Krossi í Sunnbö.

*Kristina* er seinna navn í samansetingum Anna K. og Sunneva K., sí eisini C.

19 *Lisbeth* eru ikki í Fámjin og heldur ikki í Froðbiar sókn; men annars eru L. í öllum bygdum í Suðuroy. Aldur úr 84 niður í 5 ár. Sí eisini Elisabeth og Anna Lisbeth.

20 *Malena* eru í öllum sóknum í Suðuroy uttan í Vági, men har eru tvær Anna M., og ein triðja Anna M. er í Hvalbö eins og Ellen M. Sí eisini Elsebeth M. og Sunneva M. Tá eru tilsamans 28, ið eita M. annaðhvört einsamalt ella aftrat öðrum fremsta navni, men M. kemur ikki fyri sum fremra navn av tveimum.

53 *Maren* eru í öllum sóknum í Suðuroy, men finst bara sum staknavn uttan í eini samanseting:

1 *Maren Abilgail* Solgaard, sum er ársgomul dóttir at 24 ára ógiftu tænastukvinnu í Giljum í Hvalbö, er ætlandi

óskilgitin dóttir 23 ára norska kolavinnumans Jacob Solgaard, sum býr í öðrum húsi í Hvalbö.

4 *Margrethe* er bert ein í Sunnbö 69 ár, tvær í Vági: Omma 84 og ommudóttir 6 ár, og ein 11 ára Margretha í Porkeri. Har aftrat er ein Anna M. og ein M. Chatrina.

1 *Margretha Chatrina* Müller er 5 ára dóttir prests í Hvalbö.

1 *Maria* er 52 ára bóndakona í Giljum í Hvalbö. Har umframt er M. seinna navn í samansetingum Anna M., Ellen M., Elsebeth M., Caren M., Rachel M., Sara M., Sunneva M. og Susanna M. Fremra navn í samanseting er M. bert í M. Chatrine.

1 *Marie Chatrine* er 20 ára ógift dóttir Tormans í Trongisvági.

4 *Marianna.* Elsta M. er 39 ára einkja í Hvalbö. Hon er skrivað Mariane Nattestad f. Niclasdatter. Hinar tríggjar eru skrivaðar Marianna, eru allar yngri enn 14 ár og búgva í Hvalbö, Fámjin og í Vági.

1 *Rachel Maria* er 3 ára smágenta í Sunnbö.

1 *Sara Maria* er 23 ára ógift dóttir Giljabóndans í Hvalbö. Omman (vermóðir Giljabóndans) æt Sára, men hon doyði millum 1. februar og 1. august 1801, og hon er ikki við í teljingini.

*Sophia* finst bert í samansetingum Anna S., Elsebeth S. og Susanne S.

56 *Sunneva* eru í öllum bygdum, og har aftrat eru 6, ið hava S. sum fremra navn í samansetingum S. Kristina, S. Malena, S. Maria og S. Susanna.

1 *Sunneva Christina* er 5 ára dóttir Sunnevu bóndakonu í Hörg í Sunnbö, sum er dóttir aðra Sunnevu, ið eisini býr í sama húsi.

1 *Sunneva Kristina* er 53 ára jarðamóðir í Vági. Hon er einkja og býr hjá versoninum, bóndanum í Skálum í Vági.

2 *Sunneva Malena* eru 2 og 3 ára gentur í Hovi og í Vági. Í báðum förum er ein onnur Sunneva í sama húsi.

1 *Sunneva Maria* er 18 ára genta í Sunnbö.

1 *Sunneva Susanna* er 4 ára genta í Porkeri. Móðir hennara eitur Sunneva, og ein onnur Sunneva er í sama húsi.

21 *Susanna* eru í öllum sóknum í Suðuroy uttan í Fámjin. Eisini í Fámjin var ein S. 1. februar 1801, men hon doyði 82 ára gomul fyri 1. august 1801, og er hon tí ikki við í teljingini. Aftrat eru 2, ið hava S. sum seinna navn í samansetingum Elsebeth S. og Sunneva S., og 3, ið hava S. sum fremra navn í samansetingum S. Maria og S. Sophia.

1 *Susanna Maria* er 7 ára dóttir bóndans á Krossi í Sunnbö.

2 *Susanne Sophia* eru 2 og 3 ára gentur í Vági og í Froðbö.

375 kvinnur í Suðuroy 1801.

*Mannanövn í Suðuroy 1801.*

1 *Abraham* er 40 ára húsbóndi í Sjóvartoftum í Trongisvági.

2 *Anders* eru húsfedrar ávikavist í Svalbarði í Trongisvági, 58 ár, og undir Skorum í Froðbö, 29 ár.

10 *Andreas.* 6 A. eru í Hvalbö. Tríggir av teimum eru ógiftir norðmenn í kolanáminum, og ein fjórði, A. Kamp, er helst eisini útlendingur. Eftir eru ein 8 ára drongur og ein 22 ára húskallur á prestagarðinum í Leirum. A. í Froðbö er 16 ára húskallur. Teir báðir í Vági eru eisini húskallar, 67 og 17 ár, men í Sunnbö er A. 23 ára ógiftur sonur í húsi.

2 *Antonius* eru 19 ára drongur í Hvalbö og 32 ára húsbóndi í Sunnbö. Har aftrat er A. seinna navn í samanseting Peder A.

2 *Augustinus* eru báðir í Vági, 14 og 4 ár.

1 *Bertel* er 43 ára óðalsbóndi í Sunnbö.

*Bærent* er bert í samanseting Jan B.

1 *Christian Rubek* er 9 ára sonur at giftum norðmanni í kolanáminum og bróðir at Henrich Ludvig og Joen Zidske í Hvalbö.

2 *Christopher* eru 67 ára sóknarpresturin C. Müller í Leirum í Hvalbö, og 8 ára sonur hans.

2 *Clement* eru 74 ára gamal drongur í Hvalbö og 13 ára húskallur í Toftum í Vági.

28 *Daniel* eru í öllum sóknum í Suðuroy í öllum aldrum. Har aftrat er D. fremra navn av tveimum í samansetingum D. Jacob og D. Joen, men hetta seinna er heldur samansett eftirnavn enn fornavn.

1 *Daniel Jacob* er 5 ára bóndasonur undir Hamri í Sunnbö.

1 *Daniel Joen,* t. e. D. J. Willumsen, træsmiður við Mysá í Vági, er 39 ár; men líkt er til, at millumnavnið Joen hoyrir heldur til eftirnavnið enn til fornavnið, sbr. Jesper J. W., Poul J. W. og Thomas J. W. Elsti sonur at D. J. W. eitur Joen Willum.

2 *Elias* eru báðir í Hvalbö, 63 og 51 ár.

1 *Ellender,* 65 ára bóndi við Toftir í Hvalbö, er einnevndur í oynni 1801.

1 *Gabriel,* 52 ára húsbóndi undir Homrum í Porkeri er eisini einnevndur.

1 *Gregers* Gregersen er 28 ára ógiftur bróðursonur Christopher Müllers prests og býr í Leirum í Hvalbö, »har faldende Syge og nyder Naadsens Bröd«.

4 *Gulak.* Elsti G. er 52 ára húsbóndi í Hvalbö, og miðlingasonur hans eitur eisini G. 8 ár. Hesin eigur javnaldraðan navna í Trongisvági, son áðurnevnda Ábraham í Sjóvartoftum. Fjórði G. er 29 ára drongur í Øravík.

1 *Gutte* er 41 ára óðalsbóndi undir Homrum í Hovi.

8 *Hans.* Elsti H. er 89 ára haldbóndi í Sunnbö, og har er eisini 18 ára húskallur H. Í Vági er H. 54 ára húsbóndi og í Porkeri er H. 22 ára ógiftur sonur fyrrnevnda Gabriel Hansen undir Homrum. Í Fámjin eru tveir H. í sama húsi, abbin 61 ár og abbasonur 1 ár. Í Hvalbö eru eisini tveir H., ávikavist 75 og 46 ár.

1 *Henrich Ludvig* er borin í Hvalbö millum 1. februar og 1. august 1801. Hann er sonur norska kolamans Ole Hansens og bróðir teirra Christian Rubeks og Joen Zidske. *Henrik* er bert í samansetingum Johan H. og H. Ludvig.

33 *Jacob* eru í öllum sóknum í Suðuroy og í öllum aldri upp

til 89 ár. Eisini er J. seinna navn í samansetingum Daniel J. og Joen J.

1 *Jacob Horn* er 85 ára maður í Vági. Horn man helst vera eftirnavn, men sonurin er kortini skrivaður Jacobsen. Aftur ímóti er ársgomul ætlandi óskilgitin dóttir norðmansins Jacob Solgaards í Hvalbö skrivað Maren Abigail Solgaard.

1 *Jacob Johannes* er 11 ára drongur í Hvalbö.

1 *Jan Bærent* er 68 ára einkjumaður í Hvalbö. Hann er farbróðir bóndakonunnar í Giljum.

14 *Jens.* Kalsmenn tveir í Sunnbö eita J. og somuleiðis elsti sonur yngra kalsmans. Merkiligari er, at tveir bröður í Sunnbö, 13 og 24 ár, eita báðir J., og kann hetta benda á, at J. longu fyri 1801 er framborið á ymiskan hátt (Janus, Jens?). Sama er at siga um Joen. Aðrir J. eru abbi og abbasonur á Jaðri á Nesi, faðir og sonur á Hamri í Froðbö, ein sekstiára húskallur í Froðbö, abbi og abbasonur í Hvalbö, og enn tveir J. í Hvalbö, 47 og 6 ár.

11 *Jesper* Elsti J. er 74 ára óðalsbóndi á Hamri í Froðbö, og í sama húsi er 14 ára abbasonurin navni hans. Elsti húskallur sóknarprestsins í Hvalbö er 30 ára ógiftur J. Uppi í Bö í Øravík eitur elsti sonur bóndans J. eftir abbanum, og í Fámjin er J. 18 ára sonur í húsi. Tríggir J. eru í Hovi, 55, 40 og 10 ár, hvör í sínum húsi. Í Porkeri er J. 4 ára sonur í Eystrum, og í Sunnbö eita bóndin í Görðum og sonur hans báðir J., 69 og 18 ár.

1 *Jesper Joen* er J. J. Willumsen, 49 ár, í Vági; men sum áður er víst á, er Joen her heldur partur av eftirnavninum enn av fornavninum, sbr., Daniel J. W., Poul J. W. og Thomas J. W.

54 *Joen* eru í öllum sóknum; men sum nomið við í samband við navnið Jens, er líkt til, at hesi növn hövdu ymiskan framburð (Jógvan, Jóan ella Jón?) fyri 1801, tí tveir synir yngra kalsmans í Sunnbö eru báðir skrivaðir J., og illa er hugsandi, at tveir heimastaddir bröður, 20 og 11 ár, hava sama navn. Í Bökkum í Porkeri eru tveir hálv-

bröður báðir skrivaðir J., og í Görðum í Porkeri eru 4 J. í sama húsi, men teir eru allir húskallar, og einki er sagt um skyldskap teirra millum. Aftrat teim 54, ið bera J. sum einasta fornavn, eru 5, ið hava J. sum fremri navn av tveimum: J. Jacob, J. Willum og J. Zidske. Sí eisini Johan og oftnevndu Daniel J., Jesper J., Poul J. og Thomas J. Willumsen, hvörs J.-millumnavn heldur hoyrir til eftirnavnið enn fornavnið.

2 *Joen Jacob.* Eldri J. J. er 20 ára bóndasonur við Kvíggjá í Sunnbö, og yngri J. J. er borin í Hvalbö millum 1. februar og 1. august 1801.

2 *Joen Willum* eru 7 og 3 ára smádreingir við Mysá í Vági og við Geil í Porkeri. Teir eru óivað abbasynir at einum J. W., tí faðirin at öðrum og móðirin at hinum eru skrivað ávikavist Daniel Joen Willumsen og Sunneva Joen Willumsdatter.

1 *Joen Zidske* er 4 ára sonur norðmansins Ole Hansens í Hvalbö og bróðir at Christian Rubek og Henrich Ludvig.

*Johan* kemur bert fyri í samansetingum J. Henrik og J. Peder, sí tó eisini Joen.

1 *Johan Henrik* er 31 ára ógiftur hjálparprestur og sáttardómari: J. H. Schröter við Gjógvará í Vági.

1 *Johan Peder* er 12 ára drongur í Hvalbö.

22 *Johannes* eru í öllum sóknum uttan í Vági. Ongantíð er J. fremra navn av tveimum, men einaferð seinna navn í samanseting Jacob J.

5 *Lars* eru allir eldri enn 64 ár uttan ein 3 ára sonur bóndans í Görðum í Porkeri, sum óivað er uppkallaður eftir abbanum.

*Lave* finst bert í samanseting Peder L.

*Ludvig* finst bert í samanseting Henrich L.

11 *Magnus.* Í Vági eru 3 M.: 72 ára óðalsbóndi við Kráir, 5 ára abbasonurin og ein 2 ára drongur, sum uppkallaður er eftir abba sínum. Í Porkeri eru eisini 3 M.: 29 ára bóndasonur í Eystrum, sum uppkallaður er eftir abbanum, ein 75 ára abbi og 12 ára abbasonur hans. Við Garð í

Hovi eitur 41 ára bóndasonur M. eftir abbanum. Í Húsi í Trongisvági er 2 ára M. uppkallaður eftir abba sínum. Undir Skorum í Froðbö er 63 ára abbi og 5 ára abbasonur, og í Hvalbö er ein 32 ára M.

18 *Michel* eru í öllum sóknum og á öllum aldri.

12 *Morten* eru í öllum sóknum uttan í Fámjin. Aldur: 3—63 ár.

23 *Niclas* eru í öllum sóknum, mest í Sunnbö (9) og í Hvalbö (5). Aldur: 1—93 ár.

2 *Niels*, abbi 67 og abbasonur 15 ár, báðir í sama húsi í Hovi.

29 *Ole* eru í öllum sóknum, mest í Hvalbö (12 föroyingar og 1 norðmaður). Aldur: 1—75 ár.

17 *Peder* eru í öllum sóknum uttan í Fámjin, 6—73 ár. Umframt teir 17, ið hava P. sum einasta fornavn, er ein Johan P., ein P. Antonius og tveir P. Lave. Gamli sýslumaðurin, P. Poulsen við Á í Óravík, doyði 92 ára gamal aftaná 1. februar men fyri 1. august 1801, og hann er tí ikki taldur við her.

1 *Peder Antonius* er 4 ára drongur á Jaðri, á Nesi.

2 *Peder Lave* eru 69 ára húsbóndi og 1 ára abbasonur hans í sama húsi í Froðbö.

15 *Poul* eru í öllum sóknum uttan í Fámjin. Aldur: 3—75 ár.

1 *Poul Joen* Willumsen, ógiftur, 38 ár, »vanvittig Almisselem« býr hjá bróður sínum Jesper J. W. í Vági. Annar bróðir er Thomas J. W. og helst eisini Daniel J. W. Millumnavnið Joen hoyrir helst uppí eftirnavnið, tí eisini matmöðurnar við Geil í Porkeri og á Bö í Froðbö skrivast ávikavist Sunneva Joen Willumsdatter og Susanna Joen Willumsdatter.

4 *Rasmus*. Elsti R. er 72 ára ógiftur bróðir óðalsbóndans á Hamri í Froðbö. Annar er 68 ára kalsmaður í Garðshorni í Hvalbö. Triði er 22 ára húskallur í Leirum í Hvalbö, og fjórði er 17 ára Rasmus Müller, prestasonur í Hvalbö. *Rubek* finst bert í samanseting Christian R.

3 *Samuel*. Elsti S. er 57 ára bóndi í Sjúrðargarði í Fámjin. Hinir báðir eru javnaldrar, 22—23 ár, í Sunnbö.

12 *Simon* eru í öllum sóknum uttan í Vági. Teir eru allir eldri enn 19 ár.

4 *Sören*. Elsti S. er 83 ára óðalsmaður í Oravík. Annar er 42 ára húsmaður í Hvalbö, og hinir báðir eru í Sunnbö, 29 og 21 ár.

24 *Thomas*. Helmingurin (12) er í 9 húsum í Sunnbö. Hinir eru 3 í Vági, 3 í Fámjin, 3 í Froðbiar sókn og 3 í Hvalbö. Aldur: 1—65 ár.

1 *Thomas Joen* Willumsen, 41 ára fyristöðumaður á náðingsgarðinum í Vági, er ein av teim oftnevndu 4 monnum og 2 kvinnum, og er teirra millumnavn Joen meira at rokna sum partur av eftirnavninum enn fornavninum.

1 *Thorleif* Pedersen Foldal er 34 ára ógiftur norskur kolamaður í Hvalbö.

1 *Thormand* Pedersen er 54 ára húsmaður í Trongisvági.

*Willum* finst bert í samanseting Joen W.

3 *Zacharias*. Elsti Z. er 58 ára húsmaður í Hovi. Annar er 31 ára uppsitari á »Forleningsgodset« við Geil í Porkeri og triði er 25 ára húskallur í Hörg í Sunnbö.

*Zidske* er bert í samanseting Joen Z.

406 menn í Suðuroy 1801.

*Eftirnövn í Suðuroy 1801.*

Av tí at eftirnövnini í 1801 yvirhövur eru faðirs fornavn + endingina -datter ella -sen, ber til við teimum at fara eitt ættarlið longur aftur í tíðina mannanövnum viðvíkjandi.

3 eftirnövn eru ógreind, við tað at móðirin Lisbeth Jensdatter í Sunnbö situr einkja við trimum ógiftum synum, og faðirnavnið er ikki tilskilað.

5 *Abrahams-* eru fyrst og fremst Ábraham A. í Sjóvartoftum í Trongisvági, og tveir synir hans. 48 ára matmóðirin á Teigum í Fámjin og 45 ára matmóðirin á Bö í Oravík bera eisini A.-eftirnavnið.

11 *Anders-* eru í öllum sóknum í aldri upp til 71 ár.
2 *Antonius-* eru 4 og 1 ára synir 32 ára Antonius í Sunnbö.
4 *Augustinus-* eru allir gamlir menn í Hvalbö, 87, 77, 74 og 68 ár.
5 *Bertels-* eru bara í Sunnbö: 92 ára uppgávumaður (Fledföring), 74 ára einkja, og trý börn hins einnevnda Bartals í Sunnbö.
60 *Daniels-* eru í öllum bygdum í Suðuroy í öllum aldri.
3 *Elias-* eru bara í Hvalbö: 65 ára bóndi við Toftir, 46 ára matmóðir, og 23 ára ógift dóttir Giljabóndans.
5 *Ellenders-*. Sum ávíst undir mannanövnum var Ellindur bóndi við Toftir í Hvalbö einnevndur í Suðuroy 1801. Men umframt tvey heimaverandi börn hans og 26 ára matmóður, sum kanska eisini er dóttir hans, í Hvalbö, eru tveir 67 og 61 ára menn í Vági og í Fámjin, sum hava eftirnavnið E.
1 *Evens-* er eingin uttan Ole Evensen, sýslumaður í Hvalbö.
1 *Foldal* er Thorleif Pedersen F., 34 ára ógiftur norskur kolamaður í Hvalbö.
1 *Gabriels-* er sonur einnevnda Gabriels undir Homrum í Porkeri.
1 *Gregers-* er Gregers Gregersen í Leirum í Hvalbö; men annar maður hevur G. sum millumnavn: Andreas Gregersen Sinclair.
6 *Gulaks-* eru trý heimaverandi börn Gulak Mikkelsens í Hvalbö, og tey bæði: 22 ára Michel G. á grannagarðinum og 17 ára Malena G. á Hólum í Hvalbö eru kanska eisini börn hans. Ikki er óhugsandi, at 11 ára Niclas G., sum tænir á náðinsgarðinum í Vági, eisini er sonur Gulaks í Hvalbö.
2 *Guttes-*. Niclas G. er 70 ára faðir húsbóndans á Oyri í Vági, og Sunneva Malena G. er 2 ára dóttir einnevnda Gutta undir Homrum í Hovi.
3 *Haldans-* er í einum föri ikki faðirsnavn, men navn húsbóndans. Tað er 56 ára Cicilia Haldansen f. Thomasdatter, prestaeinkja á náðinsgarðinum í Vági. Hini eru

84 ára Lisbeth H., vermóðir yngra kalsmans í Sunnbö, og 44 ára sonarkona óðalsbóndans á Hamri í Froðbö. (Haldan er ikki til sum fornavn).

20 *Hans-* eru í somu bygdum sum fornavnið Hans, t. e. í öllum sóknum uttan Froðbiar sókn. Í Hovi finst fornavnið ikki, men ein 64 ára kona ber eftirnavnið H.

1 *Hermans*-datter skrivast 51 ára Maren, kona eldra Jens kalsmans í Sunnbö. (Herman er ikki til sum mansnavn í Suðuroy 1801).

1 *Horn* man vera eftirnavn 85 ára Jacob Horns í Vági, men sonurin verður skrivaður Niclas Jacobsen.

71 *Jacobs-* eru í öllum bygdum í Suðuroy uttan Hovi. Har er tað heldur ikki sum fornavn.

21 *Jens-* eru í somu bygdum sum fornavnið Jens og har aftrat ein í Vági og ein í Porkeri.

14 *Jespers-* eru í somu bygdum sum fornavnið Jesper, t. e. allastaðni uttan í Vági, á Nesi og í Trongisvági.

98 *Joens-* er vanligasta eftirnavn og finst í öllum bygdum.

27 *Johannes-* eru í öllum sóknum uttan Froðbiar og Fámjins sókna. Har er kortini Johannes sum fornövn, men í Vági er tað bert sum eitt eftirnavn.

1 *Kamp,* 58 ára giftur umsjónarmaður Andreas Kamp við kolavirkið í Hvalbö, man vera útlendingur, tóat tað er ikki tilskilað.

6 *Lars-* eru spjaddir í öllum sóknum uttan Fámjins og Vágs sóknum. Í Fámjins finst kortini fornavnið Lars, men í Vági er tað hvörki for- ella eftirnavn.

26 *Magnus-* eru í somu bygdum sum fornavnið Magnus og har aftrat í Øravík, men í Fámjins og Sunnbiar sóknum finst eingin M.

41 *Michels-* eru í öllum bygdum, eisini á Nesi, har tað ikki finst sum fornavn.

31 *Mortens-* eru í öllum sóknum, eisini Fámjins, har tað ikki finst sum fornavn.

6 *Müller* eru 67 ára sóknarpresturin í Leirum í Hvalbö og fimm börn hansara.

1 *Myre* er 23 ára ógiftur norskur kolamaður í Hvalbö, Andreas M.

4 *Nattestad* eru 39 ára einkja Mariane N. f. Niclasdatter og trý börn hennara í Hvalbö.

55 *Niclas-* eru í öllum sóknum, og eins og fornavnið mest í Hvalbö (14) og í Sunnbö (13).

1 *Niels-* er 40 ára Daniel N. í Hovi, sum er sonur eldra Niels og faðir yngra Niels, og aðrir Niels eru ikki í Suðuroy.

55 *Oles-* eru í öllum sóknum eins og fornavnið Ole.

34 *Peders-* eru í öllum sóknum uttan Fámjin; har er tað heldur ikki sum fornavn.

33 *Pouls-* eru í öllum bygdum uttan í Hovi.

2 *Rasmus-* eru báðir í Hvalbö, men í hvör sínum húsi.

4 *Samuels-* eru trý í Sjúrðargarði, Fámjin, og eitt í Sunnbö.

1 *Schröter* er Johan Henrik S., 31 ára hjálparprestur í Vági.

2 *Sigvards-* eru tvær 87 og 85 ára einkjur ávikavist í Vági og í Fámjin. (Sigvard er ikki til sum fornavn í Suðuroy 1801).

24 *Simons-* eru í öllum bygdum uttan í Vági.

1 *Sinclair* er 23 ára ógiftur norskur kolamaður: Andreas Gregersen S. í Hvalbö.

2 *Solgaard* eru 23 ára ógiftur norskur kolamaður Jacob S. og ætlandi óskilgitin dóttir hans Maren Abilgail S., bæði í Hvalbö.

9 *Sörens-* eru abbi og abbasonur í Hvalbö, omma og ommusonur í Sunnbö, tvey systkin í Óravík, tvey í Fámjin og ein 3 ára óskilgitin dóttir köksgentu J. H. Schröters í Vági.

57 *Thomas-* eru í öllum sóknum, mest í Sunnbö (24) og í Vági (14).

5 *Thormands-* eru börn einnevnda Thormand Pedersens í Trongisvági, og har aftrat tvær systrar í Hvalbö og bóndin á Bö í Froðbö.

6 *Willums-* eru oftnevndu 4 mans í Vági, sum allir hava millumnavnið Joen, og matmöðurnar á Bö í Froðbö og

við Geil í Porkeri. Eisini tær hava millumnavnið Joen, og helst eru tey systkin öll seks.

1 *Wölner* er 24 ára ógiftur norskur kolamaður Andreas W. í Hvalbö.

7 *Zacharias*- eru omma og 3 ommubörn við Geil í Porkeri, 64 ára húsbóndi í Sunnbö, 20 ára drongur í Hovi og 32 ára »indfödt Arbejder ved Stenkulværket« í Hvalbö.

781 fólk í Suðuroy 1801.

## 1. talva: *Kvinnunövn í Suðuroy 1801*

| | | *Froðbiar sókn* | | | *Þorkeris sókn* | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hvalböur | Froðböur | Øravík | Trongisvágur | Þorkeri | Nes | Hov | Vágur | Fámjin | Sunnböur | Tilsamans |
| Agitha | | | | | | | | | | 2 | 2 |
| Anna | 11 | 3 | 2 | 2 | 4 | 1 | 3 | 6 | 6 | 7 | 45 |
| Anna Chatrina | 3 | 3 | | | | | | | 1 | | 7 |
| Anna Elisabeth | | | | | | | | | 2 | | 2 |
| Anna Kristina | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Anna Lisbeth | | | 1 | | 1 | | | | | | 2 |
| Anna Malena | 1 | | | | | | | 2 | | | 3 |
| Anna Margretha | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Anna Maria | 1 | | | | | | | 1 | | 2 | 4 |
| Anna Sophia | 2 | 1 | | | | | | | | | 3 |
| Barbara | | | | | 1 | | 1 | | | | 2 |
| Bille | 2 | | | | 2 | | | 3 | | 1 | 8 |
| Birgitte | | | | | 3 | | | 1 | | 1 | 5 |
| Caren Maria | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Charen | 2 | | | | | | | | | | 2 |
| Chatrina | 5 | 1 | 1 | 5 | 1 | 2 | 1 | 2 | 1 | 1 | 20 |
| Christen | | | | | 1 | | | | | | 1 |
| Christianna | | | | | | | | | 1 | | 1 |
| Christine | 3 | | 1 | | 2 | | | | | | 6 |
| Cicilia | 1 | | | | | | | 1 | | 1 | 3 |
| Dorthea | | 1 | | | | | | | | | 1 |
| Elisabeth Christine | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Ellen | 4 | | 1 | 1 | | 1 | | | 1 | 1 | 9 |
| Ellen Malene | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Ellen Maria | 1 | 1 | | 1 | | | | | | | 3 |
| Elsebeth | 12 | 2 | 1 | 1 | 4 | | | 6 | 1 | 8 | 35 |
| Elsebeth Chatrina | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| Elsebeth Helena | 1 | | | | | | | 1 | | | 2 |
| Elsebeth Malena | | | | 1 | | | | | 1 | | 2 |
| Elsebeth Maria | 2 | 1 | | | | | | | | 1 | 4 |
| Elsebeth Sophia | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Elsebeth Susanna | | | | | 1 | | | | | | 1 |
| Johanna | 2 | | | | | | | | | | 2 |
| at flyta | 56 | 13 | 7 | 12 | 20 | 4 | 5 | 25 | 14 | 26 | 182 |

| | | *Froðbiar sókn* | | | *Porkeris sókn* | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hvalböur | Froðböur | Øravík | Trongisvágur | Porkeri | Nes | Hov | Vágur | Fámjin | Sunnböur | Tilsamans |
| flutt | 56 | 13 | 7 | 12 | 20 | 4 | 5 | 25 | 14 | 26 | 182 |
| Juliana | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Lisbeth | 2 | | | | 6 | 1 | 2 | 3 | | 5 | 19 |
| Malena | 5 | 2 | 1 | | 3 | 1 | 2 | | 5 | 1 | 20 |
| Maren | 12 | 4 | 2 | 4 | 5 | | 5 | 7 | 1 | 13 | 53 |
| Maren Abilgail | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Margrethe | | | | | 1 | | | 2 | | 1 | 4 |
| Margretha Chatrina | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Maria | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Marie Chatrine | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| Marianna | 2 | | | | | | | 1 | 1 | | 4 |
| Rachel Maria | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Sara Maria | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Sunneva | 8 | 2 | 3 | 3 | 9 | 2 | 7 | 9 | 5 | 8 | 56 |
| Sunneva Christina | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Sunneva Kristina | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Sunneva Malena | | | | | | | 1 | 1 | | | 2 |
| Sunneva Maria | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Sunneva Susanna | | | | | 1 | | | | | | 1 |
| Susanna | 5 | 4 | | | 4 | | 1 | 3 | | 4 | 21 |
| Susanna Maria | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Susanna Sophia | | 1 | | | | | | 1 | | | 2 |
| Tilsamans | 94 | 26 | 13 | 20 | 49 | 8 | 23 | 53 | 26 | 63 | 375 |

## 2. talva: *Mannanövn í Suðuroy 1801*

| | | *Froðbiar sókn* | | | *Porkeris sókn* | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hvalböur | Froðböur | Øravík | Trongisvágur | Porkeri | Nes | Hov | Vágur | Fámjin | Sunnböur | Tilsamans |
| Abraham | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| **Anders** | | 1 | | 1 | | | | | | | 2 |
| Andreas | 6 | 1 | | | | | | 2 | | 1 | 10 |
| Antonius | 1 | | | | | | | | | 1 | 2 |
| Augustinus | | | | | | | | 2 | | | 2 |
| Bertel | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Christian Rubek | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Christopher | 2 | | | | | | | | | | 2 |
| Clement | 1 | | | | | | | 1 | | | 2 |
| **Daniel** | 7 | | 2 | 2 | 5 | 2 | 3 | 1 | 1 | 5 | 28 |
| Daniel Jacob | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Daniel Joen | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Elias | 2 | | | | | | | | | | 2 |
| Ellender | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Gabriel | | | | | 1 | | | | | | 1 |
| Gregers | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Gulak | 2 | | 1 | 1 | | | | | | | 4 |
| Gutte | | | | | | | 1 | | | | 1 |
| Hans | 2 | | | | 1 | | | 1 | 2 | 2 | 8 |
| Henrich Ludvig | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Jacob | 10 | | | 2 | 1 | | | 7 | 4 | 9 | 33 |
| Jacob Horn | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Jacob Johannes | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Jan Bærent | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Jens | 4 | 3 | | | | 2 | | | | 5 | 14 |
| **Jesper** | 1 | 2 | 1 | | 1 | | 3 | | 1 | 2 | 11 |
| Jesper Joen | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Joen | 8 | 4 | | 3 | 11 | 1 | 5 | 10 | 2 | 10 | 54 |
| Joen Jacob | 1 | | | | | | | | | 1 | 2 |
| Joen Willum | | | | | 1 | | | 1 | | | 2 |
| Joen Zidske | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Johan Henrik | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Johan Peder | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| at flyta | 55 | 11 | 4 | 10 | 21 | 5 | 12 | 29 | 10 | 38 | 195 |

| | | *Froðbiar sókn* | | | *Porkeris sókn* | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hvalböur | Froðböur | Øravík | Trongisvágur | Porkeri | Nes | Hov | Vágur | Fámjin | Sunnböur | Tilsamans |
| flutt | 55 | 11 | 4 | 10 | 21 | 5 | 12 | 29 | 10 | 38 | 195 |
| Johannes | 5 | | 2 | | 4 | | 2 | | 1 | 8 | 22 |
| Lars | 2 | | | | 1 | | | | 1 | 1 | 5 |
| Magnus | 1 | 2 | | 1 | 3 | | 1 | 3 | | | 11 |
| Michel | 3 | 4 | 2 | 1 | 2 | | 1 | 1 | 2 | 2 | 18 |
| Morten | 3 | 1 | 1 | | 2 | | 2 | 2 | | 1 | 12 |
| Niclas | 5 | 1 | 1 | | 2 | | | 4 | 1 | 9 | 23 |
| Niels | | | | | | | 2 | | | | 2 |
| Ole | 13 | 1 | | | 5 | | 4 | 2 | 2 | 2 | 29 |
| Peder | 6 | 1 | 1 | 3 | 3 | | | 1 | | 2 | 17 |
| Peder Antonius | | | | | | 1 | | | | | 1 |
| Peder Lave | | 2 | | | | | | | | | 2 |
| Poul | 5 | | 1 | 3 | 1 | 1 | | 1 | | 3 | 15 |
| Poul Joen | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Rasmus | 3 | 1 | | | | | | | | | 4 |
| Samuel | | | | | | | | | 1 | 2 | 3 |
| Simon | 2 | 2 | | 1 | 1 | 1 | 2 | | 1 | 2 | 12 |
| Sören | 1 | | 1 | | | | | | | 2 | 4 |
| Thomas | 3 | 1 | | 2 | | | | 3 | 3 | 12 | 24 |
| Thomas Joen | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Thorleif | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Thormand | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| Zacharias | | | | | 1 | | 1 | | | 1 | 3 |
| Tilsamans | 108 | 27 | 13 | 22 | 46 | 8 | 27 | 48 | 22 | 85 | 406 |

## 3. talva: *Eftirnövn í Suðuroy 1801*

| | | *Froðbiar sókn* | | | *Porkeris sókn* | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hvalböur | Froðböur | Øravík | Trongisvágur | Porkeri | Nes | Hov | Vágur | Fámjin | Sunnbøur | Tilsamans |
| Abrahams- | | | 1 | 3 | | | | | 1 | | 5 |
| Anders- | 3 | 1 | | | | | 2 | 2 | 1 | 2 | 11 |
| Antonius- | | | | | | | | | | 2 | 2 |
| Augustinus- | 4 | | | | | | | | | | 4 |
| **Bertels-** | | | | | | | | | | 5 | 5 |
| Daniels- | 8 | 1 | 7 | 3 | 9 | 3 | 8 | 6 | 3 | 12 | 60 |
| Elias- | 3 | | | | | | | | | | 3 |
| Ellenders- | 3 | | | | | | | 1 | 1 | | 5 |
| Evens- | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Foldal | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Gabriels- | | | | | 1 | | | | | | 1 |
| Gregers- | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Gulaks- | 5 | | | | | | | 1 | | | 6 |
| Guttes- | | | | | | | 1 | 1 | | | 2 |
| Haldans- | | 1 | | | | | | 1 | | 1 | 3 |
| Hans- | 9 | | | | 1 | | 1 | 3 | 3 | 3 | 20 |
| Hermans- | | | | | | | | | | 1 | 1 |
| Horn | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Jacobs- | 24 | 1 | 1 | 5 | 2 | 1 | | 16 | 6 | 15 | 71 |
| Jens- | 6 | 3 | | | 1 | 1 | | 1 | | 9 | 21 |
| Jespers- | 2 | 3 | 2 | | 1 | | 3 | | 1 | 2 | 14 |
| Joens- | 13 | 8 | 2 | 5 | 24 | 3 | 6 | 13 | 4 | 20 | 98 |
| Johannes- | 5 | | | | 3 | | 2 | 1 | | 16 | 27 |
| Kamp | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Lars- | 2 | | | 1 | 2 | | | | | 1 | 6 |
| Magnus- | 4 | 3 | 1 | 3 | 4 | | 3 | 8 | | | 26 |
| Michels- | 6 | 6 | 1 | 7 | 7 | 1 | 3 | 2 | 7 | 1 | 41 |
| Mortens- | 6 | 6 | 1 | | 3 | | 6 | 2 | 2 | 5 | 31 |
| Müller | 6 | | | | | | | | | | 6 |
| Myre | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Nattestad | 4 | | | | | | | | | | 4 |
| Niclas- | 14 | 2 | | | 9 | | 5 | 11 | 1 | 13 | 55 |
| Niels- | | | | | | | 1 | | | | 1 |
| at flyta | 132 | 35 | 16 | 27 | 67 | 9 | 41 | 70 | 30 | 108 | 535 |

| | | *Froðbiar sókn* | | | *Porkeris sókn* | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Hvalböur | Froðböur | Øravík | Trongisvágur | Porkeri | Nes | Hov | Vágur | Fámjin | Sunnböur | Tilsamans |
| flutt | 132 | 35 | 16 | 27 | 67 | 9 | 41 | 70 | 30 | 108 | 535 |
| Oles- | 23 | 5 | | 1 | 11 | | 4 | 4 | 4 | 3 | 55 |
| Peders- | 14 | 4 | 4 | 3 | 6 | | | 2 | | 1 | 34 |
| Pouls- | 14 | 1 | 1 | 5 | 5 | 1 | | 4 | 1 | 1 | 33 |
| Rasmus- | 2 | | | | | | | | | | 2 |
| Samuels- | | | | | | | | | 3 | 1 | 4 |
| Schröter | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| Sigvards- | | | | | | | | 1 | 1 | | 2 |
| Simons- | 4 | 3 | 1 | 1 | 1 | 6 | 3 | | 1 | 4 | 24 |
| Sinclair | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Solgaard | 2 | | | | | | | | | | 2 |
| Sörens- | 2 | | 2 | | | | | 1 | 2 | 2 | 9 |
| Thomas- | 4 | 3 | 2 | 3 | | | 1 | 14 | 6 | 24 | 57 |
| Thormands- | 2 | 1 | | 2 | | | | | | | 5 |
| Willums- | | 1 | | | 1 | | | 4 | | | 6 |
| Wölner | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| Zacharias- | 1 | | | | 4 | | 1 | | | 1 | 7 |
| ógreind | | | | | | | | | | 3 | 3 |
| Tilsamans | 202 | 53 | 26 | 42 | 95 | 16 | 50 | 101 | 48 | 148 | 781 |